Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
- ✓ **privatar lýsingar**
- ✓ **í mesta lagi 40 orð**
- ✓ **bert ein lutur í hvørjari lýsing**
- ✓ **hægsta søluvirði 20.000 kr.**

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
- ✓ **frá fyritøkum og virkjum**
- ✓ **fleiri enn 40 orð**
- ✓ **søluvirði oman fyri 20.000 kr.**

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
- ✓ **lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«**
- ✓ **Bill. merktar**

Akfør

BMW 325 i
v/ allari útgerð, í sera góðum standi, til sølu.
Tlf. 316438

CAMPINGVOGNUR
Adria Campingvognur í góðum standi til sølu.
Tlf. 282116

DIESEL BILUR TIL SØLU
Opel Vectra 1,7, diesel, árg. 1989, koyrt 155.000 km, nýsýnaður, í góðum standi. Økonomiskur, 16-18 km/l við vanligari koyring. Góð summar- og vetrardekk, gott cd-stereo anlegg kann fylgja við. Tlf. 310092, lokal 58 421167, eftir arbeiðstíð

TIL SØLU
Opel Astra CDX 1.6, 16 V. koyrt 27.000 km, árg. 8/98. Nýprísur 184.000 kr. Hevur fjarstýrt sentrallás o.m.a.
Tlf. 316365

FORD FIESTA 1.3
3 1/2 ára gamal, sum nýggjur, bíliga til sølu.
Tlf. 218867

FORD SIERRA 1,6
árg. 89, svartur, vel, sóltak, sportsfelgur, eyka píkadekk á felgum, Pioneer anlegg v/ cd-box. Koyrt 114.000 km, í góðum standi, nýsýnaður.
Tlf. 218022 / 456342 eftir kl. 18

FORD SIERRA 1,6 CL
árg. 87, 168.000 km, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 221677, e. kl. 18

FÝRA FELGUR
4 Alu-felgur til BMV 500 seriuna til sølu
Tlf. 21 77 04

HONDA ACCORD 2.0
árg. 86, bíliga til sølu. Sportfelgur fylgja við. Hevur ikki plátur.
Tlf. 452101

HONDA CIVIC
árg. 86, nýggja kobling, til sølu.
Tlf. 317570 - 283757

MAZDA 626
árg. 87, í góðum standi, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 423073

OPEL ASTRA
cdx til sølu, árg. 8/98.
Tlf. 316365

MITSUBISHI GALANT 2.0L
156 hk, árg. 31/9-1992, 4-hjóls trekk, 4-hjóls stýring, el-rútar, hita í setrum, el-spegl, el-sóltak, hevur koyrt 70.000 km, til sølu fyri 115.000 kr.
Tlf. 213335

MOTORUR/EYKALUTIR YNSKJAST
Eykalutir til ein Mitsubishi L 300, árg. 88, 2500cc, 4D 56. Er tað nakar, ið liggur inni við einum motori ella deilum, ið eg kundi keypt.
Tlf. 448585, arb.
Tlf. 422061, heima

NISSAN PATROL
árg. 9/89 við skaða til sølu.
Tlf. 215080 - 315080

OPEL ASCONA 1.6 S
hvítur, árg. 87, sýnaður 07/99 og umvældur fyri kr. 8.000,- til sølu fyri 12.000,-
Tlf. 215696

PEUGEOT 309
1,9 GT, árg. 87. Bilurin sær gott út og koyrir væl. Er sýnaður í mars 2000.
Tlf. 282116

PIRELLI PÍKADEKK
So gott sum óbrúkt Pirelli summardekk, 185/65 R14 til sølu.
Tlf. 318485 ella 221501, eftir kl. 18

SKODA FAVORIT
til sølu fyri 6.000 kr. Skrásettur fyrstu fer 21/8-90. Ongar plátur. Startmotorur í ólagi.
Tlf. 318364

TIL FORD
Originalar 14" felgur við summardekkum og skálum bíliga til sølu.
Tlf. 212789

TIL NISSAN MICRA
Fýra brúktar 13" felgur ynskjast til keyps.
Tlf. 455606 ella 221711

TIL SØLU
Nýggj Dunlop summardekk, 185x65x14, til sølu fyri 450 kr. stk.
Tlf. 317079 ella 287079

TIL SØLU
Golf 1.6 GL, árg. 87.
Tlf. 221021

TIL SØLU
Daihatsu Charma til sølu fyri 8.500 kr. Krevur ábøtur.
Tlf. 320543

TIL SØLU
Honda CRV jeepur, 2 ára gamal, til sølu fyri 135.000 kr.
Tlf. 371103 - 221469

TIL SØLU
Fýra summardekk á felgum, til Toyota Corolla, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 422086

TIL SØLU
Opel Vectra 17 td, árg. 96, til sølu. Koyrt 56.000 km, sær út sum nýggjur. CD-anlegg kann fylgja við.
Tlf. 217790

TIL SØLU
Toyota Celica 16 GTi Twin Cam. Bilurin er svartur, nýlakeraður og hevur 16" sportsfelgur, front- og bakspoilara og tuningsútstoyt. Bilurin koyrir sera væl. Prísur 55.000 kr.
Tlf. 371932

TIL SØLU
Opel Ascona 2,0i GT, árg. nov. 87, sýnaður í mars 2000, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 316736 ella 318144

TIL SØLU
Toyota Corolla 1.6 GSI, árg. 92, 117.500 km, sportskabinu, sóltak, el-spegl, sentrallás við Goodyear F1 framman og píkadekk á felgum.
Tlf. 214470, e. kl. 16.15

TIL SØLU
Fýra nýggj summardekk av merkinum Pirelli P 2000 175/70 R14, monterað á alufelgur, av merkinum »Dial« við 4 holum, 10 mm ímillum holini. Navið er 65 mm í diametur (kann minkast niður í 57 mm, við leysum innsetningsringi). Passa til t.d. Opel Vectra. Prísur 4.000 kr.
Tlf. 444540

TIL SØLU
Opel Ascona 1.6, árg. 87, krevur ábøtur, ella sum eykalutir. Motorurin hevur koyrt 118.000 km, bíliga til sølu.
Tlf. 282424

TIL SØLU
150*38, v/ skuffum, skápi undir og hillum omanfyri.
Tlf. 319103 - 311726

TIL SØLU
Skoda Felicia 1.6 GLX. Skrásettur fyrstu ferð 25. jan. 97. Er rustviðgjordur og hevur senttrallás, hita í setrum og cd-spælara. Hann kann eisini takast við til Danmarkar, tí har er hann keyptur. Prísur uml. 90.000 kr.
Tlf. 421382 ella 221683

TIL SØLU
Ein Hyundai Sonata 2.0i, árg. 9/96, til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin hevur koyrt 142.000 og er í góðum standi.
Tlf. 314212

TIL SØLU
Fýra alu-felgur til BMW til sølu. Tlf. 217704

TIL SØLU
Peugeot Speedfight, sum nýggjur, einans koyrt 400 km, til sølu um hóskandi boð fæst. Tlf. 221144

TIL SØLU
Honda Civic 1,4 i S 90 (hK), árg. nov. 96, koyrt 63.000 km. Bilurin er blár. Av útgerð hevur bilurin: Bakspoylara, 15" sportsfelgur, tuningsútstoyt, Pioneer fløguspælara, Pioneer forsterkara 2x150 W, 2 JBL hátalarar á 180 W. Píkadekk á felgum fylgja við. Bilurin er í sera góðum standi. Boð undir 95.000 kr. ongan áhuga.
Tlf. 215636, kl. 12-13, og eftir kl. 20

TIL SØLU
Fýra eldri 14" sportsfelgur til sølu fyri 150 kr. stk. Passa til Mazda.
Tlf. 210007

TOYOTA CARINA 1.8
2 ára gamal, til sølu fyri 125.000 kr.
Tlf. 371103

TOYOTA CARINA 2,0 TURBO
diesel, árg. 96, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 374900 ella 213065

TOYOTA CARINA II
árg. 91, aut. gear og sportsfelgur, koyrt uml. 140.000 km, til sølu fyri 45.000 kr.
Tlf. 455983

TOYOTA COROLLA
árg. 84, model AE. 80. 1.6, hevur plátur, til sølu fyri 6.000 kr. Ein annar fylgir við sum eykalutir.
Tlf. 421040 - 421251

TOYOTA COROLLA
árg. 87, til sølu. Sýnaður í 99. Bilurin er í góðum standi og sær gott út.
Tlf. 211832 ella 314360, lokal 25

WV PASSAT 1,6
Reyður, árg. 87, sýnaður í 99. Nýtt útstoyt. Nýggj dekk eru undir og fýra dekk á felgum fylgja við. Koyrir sera væl, hevur ikki útsjóndina við sær. Til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 447875 ella 217877

YNSKIST
14" sportsfelgur til VW Golf ynskjast til keyps.
Tlf. 373081

Amboð

DREYGIBONKUR
til at gera lutir úr t.d. leiri til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 213536

TIL SØLU
5 tons hydrauliskur rotorur, árg. 98, til grabbar o.a.
Tlf. 312779 - 281478

TIL SØLU
Mini gravimaskina, 2800 kg. Modell: Bob Cat X 325, árg. 95. Maskinan er í góðum standi.
Tlf. 212600

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
16 ára gamal drongur søkir arbeiði eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga.
Tlf. 421451

ARBEIÐI YNSKIST
Íslendsk familja, maður føroyingur. Eg søki arbeiði í Tórshavn, eri vanur við sprongiarb., múraraarb., vegarb. asfalt. Havi eisini Truck certifikat.
Vinarliga ring tlf. 0035471939, Frank

VASKIARBEIÐI
Tilkomin kvinna søkir vaskiarbeiði. Alt hevur áhuga sum t.d. handil, skrivstova ella privat.
Tlf. 448990

Barnaútgerð

ER TAÐ
nakar, ið eigur ein barnagangistól at selja mær?
Tlf. 372135

KOYRISTÓLUR
Grønur Simo koyristólur til sølu.
Tlf. 374455

PUSLITASKA
til sølu.
Tlf. 210007

SIMO TVÍBURÐAVOGNUR
líka vælegnaður til stykin jøvn á aldri, eins og tvíburðar, við ella uttan lift/um. Er spildurnýggjur. Nýprísur 5.800 til sølu fyri 3.900.
Tlf. 0045 22156308 aftaná kl. 15

TIL SØLU
Grøn lift og seingjarsett, ið hóskar til, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 317180

TIL SØLU
Lítið brúkt, grá leðurlook babylift til sølu fyri 350 kr. Nýprísur 800 kr.
Tlf. 31981

TIL SØLU
Barnavognur, 1.700 kr. Lift við madrassu, madrassa til vognin, flugunet, regnslag og puslitaska fylgir við.
Tlf. 311012

TIL SØLU
Bláur, prikkutur combi-barnavognur til sølu, bert brúktur til eitt barn, og ein gangistólur.
Tlf. 313804

TVÍBURÐAKOYRISTÓLUR
Ein gráur leðurlook tvíburðakoyristólur við galesju og slagi til sølu.
Tlf. 448036, e. kl. 18

Barnaansing

BARNAANSING
Kundi tú hugsað tær at ansa eftir Magnusi, trý og eitt hálvt ára gamal, og Guðruni, hálvt ára gomul, so ring til Kamillu tlf. 316005 ella 361170. Vit búgva úti á Reyni og tú kanst búgva hjá okkum.

BARNAANSING
Genta søkist at ansa eftir Duritu, 10 mðr., og Elin, 5 ár, frá 1. mai í nýggjum húsum í Hoyvík.
Tlf. 316815

RIMASONG
við madrassu og pútu til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 319851

TIL SØLU
Pusliborð við baðikari (til at seta oman á stórt baðikar) til sølu fyri 250 kr. Paraply koyristólur, lítið brúktur, kann regulerast í rygginum, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 316284

Bátaútgerð

10-MANNAFAR TIL SØLU
Næstan liðugt umvælt 10-mannafar verður selt bíliga. Motorur: 25 hk Albin diesel. Nærri fæst at vita við at ringja
Tlf. 447029 ella 218081, best eftir kl. 18

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Tlf.: .....

»Lýsingartorgið« *Tíðindablaðið* **Sosialurin** Box 76, 110 Tórshavn

Til frímerki

YANMAR BÁTA-MOTORAR
-frá 9 HK til 420 HK.
Vit selja og umvæla Yanmar bátamotorar.
Tosið við okkum og fá eitt gott tilboð
THOMAS DAM amboð & maskinur
Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38

BRÚKTAR AUTOMATISKAR SNEL
Vit hava nakrar bíligar, brúktar snellur á goymslu. Snellurnar verða seldar við garantii.
Tlf. 212422

KALVALÍNA
til sølu.
Tlf. 315674

LJÓSMOTORAR TIL SØLU
Tveir ljósmotorar, 15 og 30 kWa, bíliga til sølu vegna plásstrot.
Tlf. 212422

PÁHANGSMOTORAR
15–20 páhangsmotorar bíliga til sølu. 3–25 H.
Tlf. 213536

RUSTFRÍ LÍNURENNA
til sølu
Tlf. 441536, e. kl. 17

STÓRT 8-MANNAFAR
við kaldbakshúsi, Sailor VHF, lit ekkoloddi, radio, oljutýrst róðuri, 75 l oljutanga, radiatori, spuli/lensipumpu og 30 hk Leyland.
Tlf. 315734

TIL SØLU
Lítið brúktur 16 fót speedbátur við 75 HK Mariner Power Trim motori. Gongur 47 míl. Áhugað ringið
Tlf. 282116

TIL SØLU
Ein útróðrarbátur úr glasfipuri, frá 85, til sølu.
Tlf. 004575156189

TIL SØLU
Útgerð til laksafiskiskap: kassar, lína, boyur v.m. bíliga til sølu.
Tlf. 213731

TIL SØLU
Nakað av 4 mm línu bíliga til sølu.
Tlf. 315674

TIL SØLU
BMW bátamotorur, 121 KW - 165 HK, til sølu sum eykalutir. Turbina, oljupumpa, interkølari og eitt gear 1-2, bíliga til sølu.
Tlf. 373997

YNSKIST
Glastrevjabátur, 30-36 føtur, ynskist til keyps. Skal vera vælhildin, útgjørdur til fiskiskap og hava fiskiloyvi.
Tlf. 457830

Bingo

BINGO
verður í Ólastovu mánakvøldið 17. apríl kl. 19.30.
Hondbóltsfelagið Tjaldur

BINGO
verður í húsum felagsins týskv. 25. apríl kl. 19.30.
Kongshavnar Kvinnufelag

EYDNUHÁTALAR
verður í Bygdarhúsinum í Kunoy tann 6. mai kl. 19.00.
Bygdarfelagið Vesturskin

FUGLAFJARÐAR ÍTRÓTTARFELAG
ÍF hevur eydnuhjól og matsølu 6. mai í fimleikarhøll skúlans. Nógvir góðir vinningar.
ÍF

GOTT BINGO
verður í Framtíðini tórsdagin 27. apríl kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar, m.a. fleiri ferðir 200 kr. - 300 kr. og 500 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl verður.
KFUM-skótarnir í Vági

GOTT BINGO
verður í Ólastovu leygardagin 15. apríl kl. 19. 500 kr. til fulla plátu. Drigið verður millum spølini um páskaegg. Á lutaseðlinum fýra summardekk, virði 3.200 kr., og eitt sjónvarp, virði 3.295 kr.
Lymfødemfelagið

KIWANISKLUBBURIN RÓSAN
hevur bingo í Pálsstovu 2. páskadag kl. 16. Ein rekkja 75 kr. Tvær rekkjur 150 kr. Full pláta 500 kr. + síðuvinning. 15 plátur fyri 100 kr. Drigið verður millum spølini. 15 vinningar á lutaseðlinum: 11 gávukort á 100 kr., 2 gávukort á 500 kr., 2 gávukort á 1.000 kr. Eisini verður eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisklubburin Rósan

LOPPUMARKNAÐUR
1HHb á Handilsskúlanum savnar lutir til stóran loppumarknað tann 15.04. Hav í huga, alt hevur áhuga. Ring 311343/421371 og vit koma eftir lutunum.
Vinarliga 1HHb

PÁSKAEGGJA TOMBOLA
verður í Gongugøtuni leygardagin 15. apríl frá kl. 10-17.
Skótalið Sigmunds Brestissonar

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur gott páskabingo í Pálsstovu leygardagin 15. apríl kl. 15. Full pláta 400 kr. + síðuvinningar. Páskaegg millum spølini. 15 vinningar á lutaseðlinum, m.a. páskaegg, sodavatn, turr tjógv, balja við mati og gávukort á 200, 300, 500 og 1.000 kr. 15 plátur 100 kr. Koyring heim. Eykaspæl.
Stuðlafelagið Glottin

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur gott bingo í Pálsstovu hvørt mikukvøld kl. 19. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Drigið verður millum spølini. 15 vinningar á lutaseðlinum, m.a. fýra gávukort á 500 kr. og eitt á 1.000 kr. 15 plátur fyri 100 kr. Eykaspæl. Koyring heim.
Stuðlafelagið Glottin

Burturm. / funnið

BURTURMIST
Hevur nakar funnið ein gráan frakka við hettu og eina gráa tasku? Bleiv burtur leygarnáttina 8. apríl. Veitst tú um hetta, vinarliga ring
Tlf. 318999

FUNNIÐ
Hevur tú mist títt fototól Hi-Matic JS á sumri 1999. Á tólinum stendur merkt 26/2-9 - 24 myndir.
Tlf. 424453

Býli

ARBEIÐI YNSKIST
15 ára gomul genta søkir eftir arbeiði eftir skúlatíð og í vikuskiftunum. Alt hevur áhuga. Er von við børn.
Tlf. 314616

FELAGIÐ FØROYAR-KUBA
Vit eru aftur í høllstrupul-leikum. Hevur nakar eitt lítið høli til felagsvirksemi, sig okkum frá sum skjótast.
Tlf. 313016 ella 312098

HANDILSHØLI
Ætlar tú at lata upp handil í miðbýnum, so havi eg eitt stórt høli, ið eg fegin vil deila við møguliga ein klædnahandil ella okkurt heilt annað.
Skriva til:
Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 11.04.

HÚS Í HVALBA
til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 313397

HÚS Í KVÍVÍK
til leigu í vikuskiftinum. Allir hentleikar. Gott útsýni yvir bygdina.
Tlf. 447031

HÚS TIL LEIGU Í VESTURBÝNUM
Samanbygd hús í trimum hæddum til leigu frá 1. mai fyri 5.000 kr. um mðr. við el og hita. 1 mðr. depositum. Gólvvídd uml. 90 fermetrar.
Skriva til:
Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 15.04.

HÚS TIL SØLU
Hús í vesturbýnum til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 319795

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST
Hjún við 19 ára gomlum soni ynskja hús/íbúð í Tórshavn, Hoyvík, Norðasta Horni ella á Argjum til leigu skjótast. Fara væl um í allar mátar.
Tlf. 318401 - 447067

ÍBÚÐ Í KLAKSVÍK
Ungt par, bæði í føstum starvi, ynskja íbúð ella hús í Klaksvík skjótast gjørligt.
Tlf. 221250

ÍBÚÐ SØKIST
Ung, edrúilig hjún søkja eftir bústaði í Havn frá mai/juni og framvyir.
Tlf. 319239, Anita og Karl

ÍBÚÐ SØKIST
Kvinna við 4 ára gomlum barni søkir íbúð, helst tvey verilsir, frá 1. juni ella 1. juli. Má ikki vera ov dýr.
Tlf. 315913, Bjørg

ÍBÚÐ SØKIST Í HAVN
Ikki á Argjum, Norðasta Horni ella í Hoyvík. Líkamikið prís og stødd. Depositum ongin trupulleiki. Eri friðarlig og fari væl um.
Tlf. 318863 ella 345900, Sóley

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur lærari ynskir íbúð til leigu í Havn skjótast gjørligt. Fer væl um.
Tlf. 312148

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
til leigu skjótast gjørligt til hjún í 50-unum.
Tlf. 421762 ella 221913

KAMAR TIL LEIGU
til ungt fólk. Helst ikki roykja og drekka. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 314426

KAMAR/ÍBÚÐ YNSKIST
Kvinna søkir íbúð ella kamar í Havn. Eg búgvi á bygd, men arbeiði í Havn. Havi bruk fyri íbúð ella kamari í samband við arbeiðið. Kann vera møblerað.
Bill.mrk. 812132

PÁSKAFRÍ Í SUÐRI
Hugnaligar íbúðir til leigu. Fritíðarhúsið í Lopra
Tlf. 373910

PÁSKAFRÍ
Eini friðarlig, hugnalig páskir? Tey finnur tú á Mýruni í Húsavík. Bilin til dyrnar, frálíkt útsýni. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum.
Tlf. 318037, e. kl. 18

TIL LEIGU
Hús í Hvalvík til leigu. Útleigað verður stovuhædd, 120 fermetrar, og uml. 70 fermetrar av kjallaranum.
Tlf. 422007

TIL LEIGU
Kamar ella íbúð í eysturbýnum til leigu. Íbúðin hevur allar hentleikar, kann eisini vera partvís møblerað eftir ynski. Til ber at hava køksútgerð í kamarinum. Bæði íbúð og kamar hava innlagt telefon og antennustikk. Baðiverilsi er felags. Atgongd til vaskimaskinu.
Bill. mrk. 5.4.99

TIL LEIGU
Skrivstova við goymsluhøli til leigu í Søldarfirði frá 1. mai. Áhugað kunnu ringja á
Tlf. 282116

TIL SØLU
Íbúð í Keypmannahavn til sølu. 79 fermetrar, tvær altanir, terassu og svimjihylur. Aðrir fasilitetir: Stórt baðirúm v/ vaskimaskinu, nýggjan køk, hybridnet, súkklukjallari og havi. Netto 6.225 kr.
Tlf. 0045-35841234

TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, verða húsini á Kósarskákinum 6 seld.
Tlf. 456272

TVØROYRI
Skulu tygum til Suðuroyar og vilja búgva væl, so eru hús í miðbýnum til leigu vikuskifti ella styttri tíðarskeið. Sera vakurt útsýni yvir Tvøroyrarfjørð.
Tlf. 312205 - 288205

UMBÝTI Í SUMMAR
Hevur tú hús ella íbúð í Havn ella Vestmanna, sum tú kundi hugsað tær at býtt um við eini 5 rúms raðhús í Kokkedal, 25 km norðan fyri Keypmannahavn (bert 25 min við toki). Ella hevur tú hús ella íbúð, sum tú kanst leiga okkum í 1 ella 2 mðr. í summar, so ring
Tlf. 0045 49145415 ella 0045 21669348

YNSKIST
Bakaralærlingur søkir eftir kamari í Havn frá 1. mai.
Tlf. 319128 ella 045-86210220, spyrjið eftir Jónleif

YNSKIST
Hús ella íbúð ynskist til leigu. Má hava trý kømur ella meira. Prísur max. 5.000 kr. um mðr.
Tlf. 321171, e. kl. 17.30

YNSKIST
Hús ella íbúð søkist til leigu í Klaksvík skjótast gjørligt.
Tlf. 457096

YNSKIST
Familja ynskir hús/íbúð í Havn, Argjum, Hvítanesi, Norðasta Horni, Velbastað ella í Kirkjubø skjótast gjørligt.
Tlf. 004530533655, e. kl. 18

YNSKIST
Ungur maður í útbúgvingarárindum ynskir kamar til leigu í Havn frá uml. 1. aug. ella áðrenn.
Tlf. 455696, Ólavur

Dansur

GÓÐUR DANSUR
í Vestmanna 24. apríl kl. 23.00 v/ Berg og Jacobsens Dansband í Dansistovuni í Vestmanna. Øll eru vælkomin.
Ungmannafelagið Heyggur

Dýr

4 DVØRGA-HAMSTRARAUNGAR
sum eru 5 vikur gamlir, verða latnir djóravini.
Tlf. 314112, frá kl. 17

FRENSUR BURTURBLVIN
Reyður, hvítur undir øsinum og búkinum, hevur hálsbandi við tlf. nr. á., burturblivin v/ Velbastaðvegin.
Tlf. 313509

GANGA TÚR VIÐ HUNDINUM?
Hevur tú hug at ganga ein middagstúr við hundinum, so ring
Tlf. 315632, e. kl. 17

HVØLPUR FÆST
Ein ektaður border seyðahundahvølpur, tík, fæst. 2 mðr. gamal.
Tlf. 281244, e. kl. 18

KETTLINGAR
Fimm sera fittir, svartir og hvítir kettlingar verða latnir djóravinum um umleið 5-6 vikur.
Tlf. 319684, Elin og Eyðdis

KETTLINGAR
Tveir reinligir kettlingar verða latnir djóravinum.
Tlf. 444344

KETTLINGAR
Ein sera fittur, snjóhvítur frensur, 12 vikur gamal, verður latin djóravini.
Tlf. 316016 - 214884

KETTLINGUR
Sera fittur kettlingur fæst við at ringja
Tlf. 316103

TIL SØLU
Golden retriever, 9 vikur gamal hvølpur, hundur, til sølu.
Tlf. 333329

UNDULATAR
til sølu.
Tlf. 314434

Fundir

AÐALFUNDUR
Ársaðalfundur felagsins verður í skúlanum hóskvøldið 27. apríl kl. 19.
Kollafjarðar Fornminnisfelag

AÐALFUNDUR
Borðtennissamband Føroya hevur ársaðalfund leygardagin 29. apríl kl. 10 í ÍSF-húsunum. Skrá sambært lógunum.
Nevndin

AÐALFUNDUR HJÁ »HOYRNINI«
Foreldrafelagið at deyvum og tunghoyrdum børnum hevur aðalfund í Deyvahúsinum leygardagin 29. apríl kl. 14. Ina Wessberg og Finnleif Mortensen greiða frá um hoyritól og hjálpartól og svara spurningum. Øll foreldur og starvsfólk hjá hoyriveikum børnum eru vælkomin. Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

AÐALFUNDURIN
hjá Miðvágs Róðrarfelag verður í Miðvágs skúla leygardagin 22. apríl kl. 18. Skrá sambært lógini.
Miðvágs Róðrarfelag

ÁSAÐALFUNDUR
verður hildin í býlingshúsinum á Flat mikudagin 26. apríl kl. 20. Skrá samb. lógum felagsins.
Eigarafelagið á Flot

EYKAAÐALFUNDUR Frá Kappróðrarfelagnum NSÍ
Eykaaðalfundur verður í Kvinnuhúsinum 4. mai kl. 20. Á skránni viðtøkubroytingar. Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður eyka aðalfundur hálvan tíma seinni.
Nevndin

SANDOYAR SÝSLU FERÐAVINNUFELAG
Ársaðalfundur felagsins verður í hølinum hjá áhugafelagnum B71 sunnudagin 7. mai kl. 17. Skrá samb. lógini.
Arbeiðsnevndin

STOVNANDI AÐALFUNDUR
Lýst verður til stovnandi aðalfund av felagnum »Tónaungdómur« 2. mai kl. 19 í Skansastovu.
Fyrireikingarbólkurin

TSF
Eykaaðalfundur verður 27. apríl kl. 21. Á skránni: Broytingar í lógum felagsins.
Tórshavnar Súkklufelag

Húsarhaldstól

EYMHETTA
við skápi, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 313366

TIL SØLU
Miele køliskáp, h=81, b=59,5, d=56, 450 kr.
Gram frystiskáp, h=71, b=55, d=57,5, 400 kr.
Tlf. 221144

TIL SØLU
Zanussi vaskimaskina 1083, hálvt ára gomul, til sølu fyri 3.000 kr. Nýprísur 4.000 kr.
Tlf. 210007

VOSS KOMFÝRUR
Hvítur Voss komfýrur við gassblussum til sølu. Hann hevur sjálvreinsandi el-ovn við roterandi grill. Ovnurin kann tíðarinnstillast og undir honum er hitaskuffa. Alt er í góðum standi. Nýprísur 9.000 kr. Fæst nú fyri 2.000 kr.
Tlf. 447870

Innbúgv

SANITET
Hvítt vask, wc og baðikar fæst við at koma eftir tí.
Tlf. 311090

SOFASETT
Bordeaux 3 pers. sofa og tveir stólar, lítið brúkt, til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 441313

SOVISOFA
2 pers. grøn sovisofa til sølu fyri 2000 kr.
Tlf. 318474

SPÍSISTOVUBORÐ
Myrkt beistað borð, 90x160, + tvær plátur á 50 cm, til sølu fyri 900 kr. Sær út sum nýtt.
Tlf. 314699

TIL SØLU
3+1+1 gammelrosa plyssmøblar til sølu.
Tlf. 457413

TIL SØLU
Lítið brúktur, kombineraður barnavognur/stólur, 3.000 kr. Bilbarnastólur til 0-3 ár, 700 kr. Weekendsong, 200 kr.
Tlf. 448990

TIL SØLU
Papasan sofa til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 316817, e. kl. 18